# Róin Siggertson sum rockidol

**- Hetta kann fara at gerast rættiliga stórt fyri meg, sigur vestmenningurin Róin Siggertson, ið er ein av luttakaranum í sjónvarpssendingini "Rockidoler" á TV3, har tónleikarar kappast um at gerast partur av einum rockbólki**

TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*

Nýggi trendurin í donskum sjónvarpi er at geva fólki møguleikan at gerast stjørna upp á fimm minuttir. TV2 valdi í sendirøðini "Popstars" fýra út av tveytúsund vónríkum gentum, og gjørdi tær til vælumtókta gentubólkin eyeQ. Í sendirøðini "Modeljagten" á TV3 royna hundraðtals fólk av gøtuni at gerast topmodellir, og í "Stjerne for en aften" á DR fáa sangarar møguleika at senda sína tónleikakarrieru ímóti stjørnunum.

Nýggjasta skotið á stammuni er sendingin "Rockidoler" á TV3, har eitt plátufelag, ein produsari og ein royndur tónleikari skulu samanseta ein rocbólk útav teimum 550 tónleikarunum, ið hava sent ein demofløgu inn til sendingina.

Burturúr teimum mongu, ið sendu fløgur inn, eru tredivu teir dugnaligastu tónlkeikarar valdir út at luttaka í sendirøðini.

## Gongur skjótt

Ein av hesum tredivu tóneikarunum er vestmenningurin Róin Siggertson, ið seinastu árini hevur verið búsitandi í Danmark. Fyrsti partur av "Rockidoler" varð send á TV3 týskvøldið, og har sást at Róin Siggertson var væl dámdur millum dómararnar. Sjálvur er Róin eisini rættiliga væl nøgdur við luttøkuna.

- Tað líkist als ikki mær at melda meg til eitt sovorðið reality-show. Men genta mín og vinmaður min James Olsen fingu yvirtalað meg í síðstu løtu. Tá eg hoyrdi frá TV3 aftur hevði eg longu avgjørt, at eg ikki hevði hug at luttaka kortini, men tá fólkini aftanfyri sendingina høvdu ringt til mín í fimm dagar, høvdu tey fingið yvirtalað meg, og so gekk leiðin til kasernuna í Vordingborg, har sendingarnar blivu tiknar upp, greiðir Róin Siggertson frá.

Síðan tá hevur tað gingið skjótt, og hann er nú staddur á tí mest spennandi staðnum í sínum tónleikalívi higartil. Meira sleppur hann ikki siga um, hvussu luttøkan í "Rockidoler" hilnaðist. Sigur hann meir, kann hann vænta sær endurgjaldskrav frá framleiðaranum av sendingini.

- Hetta kann fara at gerast rættiliga stórt fyri meg. Tað kann eg so siga uttan at avdúka nakað, heldur Róin fyri.

## Sjónvarpið hevur maktina

Tey sonenvdu "reality showini", sum Big Brother, Baren og Popstars, eru annars ikki tað, sum fær Róin Siggertson at leggja seg framman fyri sjónvarpinum.

- Eg eri snøgt sagt troyttur av hesum reality showunum, har fólk eru við fyri at blíva kend og annars leggja líka í um tey gerast poppstjørnur ella sjónvarpsvertir. Úrslitið er, at standardurin í tónleikavinnuni lækkar. Tað er langt úti at miðlarnir hava so stóra makt, men tað vísir seg at vera torført at sleppa undan, sigur Róin Siggertson.

Spurdur um hann ikki hevur eitt sindur ringan smakk í munninum, nú hann sjálvur trínir fram á danskar sjónvarpsskíggjar í einari líknandi sending, er hann skjótur at svara:

- Nei. Eg geri hetta fyri at koma fram við mínum tónleiki. Vit kunnu væl brokka okkum um, at tað í størri og størri mun eru talentleys fólk, borin fram av miðlunum, ið mynda tónleikavinnuna. Men tá tað vísir seg, at sjónvarpið hevur maktina og í stóran mun kann stýra, hvør kemur fram her í verðini, so noyðist man at fara har, sum sjónvarpið er, sigur Róin Siggertson.



*Róin Siggertson var væl umtóktur av dómarunum í sendingini Rockidoler*

## Kendur aftur

Róin Siggertson upplivdi longu áðrenn fyrsta sendingin varð varpað út á TV3 at verða kendur aftur á gøtuni, tí fólk høvdu sæð hann í einari lýsing fyri sendingina.

- Tað er heilt løgið, tí eg eri bara eg, og tað fari eg eisini at vera, um hetta førir til nakað stórt, sigur Róin.

Hann upplivir hóvastákið kring seg bæði sum nakað eitt sindur ræðandi og samstundis sum eina viðurkenning av hansara tónlistarligu dygdum.

- Eg havi havt mítt egna studio her í Keypmannahavn og eg havi arbeitt intensivt við tónleiki nú í tvey ár, og havi ofta hugsað nær í verðini eg fór at fáa nakað aftur. Tað er í ferð við at henda nú, haldi eg, sigur Róin Siggertson, ið verður at síggja aftur komandi týskvøld á TV3.


Nú kanst tú søkja um starvið sum

# Stjóri í Granskingarráðnum

Starvið
Starvið sum stjóri í nýskipaða Granskingarráðnum er leyst at søkja.
Starvið verður sett sambært løgtingslóg nr. 85 frá 15. mai 2001, og stjórin skal m.a.:

- umsita Granskingargrunnin í samstarvi við Granskingarráðið
- gera uppskot til fíggjarætlan at leggja fyri Granskingarráðið
- hava ábyrgdina av, at fíggjarætlanin verður hildin
- hava ábyrgdina av eftirlitinum við játtaðum studningum.
- útinna tær yvirskipaðu ætlanir, sum Granskingarráðið samtykkir.
- samskipa tey fakligu og strategisku sjónarmiðini hjá Granskingarráðnum
- virka fyri at gera granskingartilfar lættari atkomiligt hjá granskarum, vinnulívi og almenningi
- virka fyri at økja samskiftið innan føroyska granskingarumhvørvið og millum granskarar og vinnulív

Førleikakrøv

Umsøkjarin skal:

- hava viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- kunna vátta, at hann er førur fyri at átaka sær tær umsitingarligu skyldur, sum fylgja við starvinum
- hava góð samstarvsevni
- vera sannførdur um tann týdning, ið gransking hevur fyri eitt nútíðar samfelag
- vera sinnaður at leggja bæði orku og hugflog í at bera føroyska gransking framá
- hava vilja og evni til at royna nýggjar leiðir

Setanar- og lønartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag. Talan kann verða um at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti sum partarnir samráðast um.

Umsókn
Umsóknir við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

Granskingarráðið
J. C. Svabosgøta 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn

Og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. mars 2002

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Guðrið Andorsdóttir, virkandi formann í Granskingarráðnum, tlf 210316

Gransking er gjølligar kanningar av ávísum evni til at økja vitanina um tað. 'Granskingar- og menningarvirksemi' (G&M) er skapandi arbeiði á skipaðum grundarlagi, sum hevur til endamáls at økja vísindaliga og tøkniliga kunnleikan; ella at brúka kunnleika, sum longu er til, og vísa á nýggja, praktiska nýtslu. Hugtakið 'granskingar- og menningarvirksemi' umfatar grundgransking, nýtta gransking og menningararbeiði.

- Grundgransking brýtur upp úr nýggjum, ger royndir ella er teoretiskt, ástøðiligt arbeiði, sum fyrst av øllum hevur til endamáls at fáa nýggja vitan og fatan til vegar uttan at hava ávísa nýtlsu í hýggju.
- Nýtt gransking fær somuleiðis nýggja vitan og fatan til vega, men nýtt gransking miðar fyrst av øllum ímóti at fremja ávís praktisk mál.
- Menningararbeiði er skipað arbeiði, sum er grundað á kunnleika, sum er fingin til vegar gjøgnum gransking og/ella praktiskar royndir við tí fyri eyga at skapa nýtt ella munandi bøtt tilfar, nýggjar og betri vørur, tilgongdir, skipanir ella tænastur.

OECD-definitiónir.

SANSIR TEL 355 355

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · J.C. Svabos gøtu 14 · Postrúm 272 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 53 02 · Fax 31 89 29 · annikas@setur.fo



Bilar

Nr. 41 • hósdagur • 28. februar 2002 • 76. árg.


# Ford Focus og Mondeo við TDCi dieselmotorum




**Ford Focus og Mondeo fáast nú við nýggjum TDCi dieselmotorum, sum nýta commomrail tøknina til at gera motorarnar sera orkusparandi og ljóðleysar. Mondeo fæst við 2.0 litur TDCi við 130 hk og Focus við 1.8 litur TDCi við 115 hk**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Minni larmur er ein av fyrimununum við nýggju commomrail skipanini. TDCi motorarnir hava eina tøkni, sum minkar møguligan larm mest møguligt. Hetta er við til at gera hesar motorarnar til teir minst dálkandi dieselmotorarnar í sínum klassa. Hesir Duratorq TDCi motorarnir hjá Ford eru nágreiniliga kannaðir fyri at økja um kvalitetin.




*Jógvan Højgaard, sølumaður hjá P/F Wenzel, sýnir her farm við nýggjasta Ford Mondeo við TDCi dieselmotorinum*

## Minni larmur innan

Tað, at brennievnið verður sprænt inn í motorin í smærri nøgdum undir høgum trýsti, gevur javnari oljunýtslu, og motorurin larmar minni. Fyri at minka um úlátið frá útstoytinum er katalysatorin settur tætt uppat motorinum. Úrslitið er, at hesir TDCi motorarnir larma so lítið, at bilførarin og tey ferðandi í bilinum lættliga kunnu tosa saman, hóast motorurin hevur nógv at gera.

# Focus best í týsku TÜV kanningini

**Í ár bleiv tað Ford Focus, ið er heimsins mest seldi persónbilur, sum bleiv nummar eitt, fyri bilar í aldrinum frá 1 til 3 ár, í árliga týsku TÜV kanningini. Hetta er fyrstu ferð í 14 ár at ein týskur bilur hevur lagt seg á odda í hesi kanning**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í nógv ár á rað hava japansku bilarnir við Toyota á odda verði nummar eitt í hesum kanningum. Í ár bleiv tað so ein týskur bilur, Ford Focus, sum fór við sigrinum fyri bilar frá 1 til 3 ár. Nummar 2 bleiv Toyota Avensis og nummar 3 blivu Toyota Starlet og Corolla.

TÜV kanningarnar eru frágreiðingar um hvussu bilarnir klára seg eftir nøkrum árum. Teir bilarnir sum hava minst brek fáa best karakter. Fyri bilar millum 4 og 5 ár bleiv Toyota Starlet nummar eitt.




*Ford Focus, ið er heimsins mest seldi bilur, bleiv nummar eitt í týsku TÜV kanningini. Umframt at Focus nú fæst við TDCi dielselmotorinum við 115 hk, hevur bilurin eisini fingið eina lættari "facelift". Jógvan Højgaard er her við nýggjastu útgávuni av Focus*